# Samstarv tvørtur um alt Norðuratlantshav

*Oyggjar í Norðuratlantshavi vilja økt samstarv innan gransking og útbúgving*

Høgni Hoydal, landsstýrismaður við norðurlandamálum, var í farnu viku í Ný Foundlandi, har hann m.a. hitti ráðharrar úr øðrum londum og oyggjum í Norðuratlantshavi.

Fundurin millum ráðharrarnar varð hildin í sambandi við eina stóra ráðstevnu, har 350 fólk umrøddu royndir við- og møguleikar fyri búskaparligari menning í Norðuratlantshavi.

Ráðharrar úr New Foundlandi, Prince Edward Island, Íslandi, Írlandi og Føroyum luttóku ráðharrafundinum.

**Menning og vinnuliga endurnýgging**

Beaton Tulk greiddi frá hvat hendi tá toskabannið bleiv sett í gildi fyri Ný Foundland í 1992, og 40.000 fólk mistu arbeiðið frá degi til dags. Hetta varð ein dyggur smeitur fyri alt samfelagið, men í dag útflytir Ný Foundland fisk fyri størri virði enn nakrantíð — hóast toskabannið framvegis er galdandi.

Tað góða úrslitið komst av, at myndugleikarnir, tað privata vinnulívið og fakfeløgini gingu saman um at umleggja fiskivinnuna til onnur fiskasløg, og løgdu størsta dentin á gransking og góðsking fyri at økja um virðið.

Í Ný Foundlandi royna myndugleikarnir at sleppa undan beinleiðis studningi til vinnulívið, og skapa í staðin góðar útbúgvingarmøguleikar og styrkja so nógv sum til ber um samskiftis- og samferðslumøguleikarnar.

Beaton Tulk helt eisini, at fosturlandskenslan var heilt avgerandi fyri ta búskaparligu menningina. Eini av ráðunum hann hevði til tann sum vildi virka fyri at tryggja búskaparliga menning í útjaðaraøkjum, vóru stutt og greitt: »Awake some patriotism!«

**Handil og ídnaður**

Valgerdur Sverrisdottir greiddi frá tí stóra trupulleikanum sum miðsavningin hevur við sær í Íslandi, har støðugt fleiri fólk flyta til Reykjavíkar.

Hetta kemst m.a. av, at bert 20% av virðisøkingini av eini vøru hevur beinleiðis samband við sjálva framleiðsluna, meðan 80% av virðisøkingini verða skapt í »spin-off« ídnaðum sum útbúgving, gransking, marknaðarføring osv. Og hesi arbeiðspláss hava lyndi til at flyta til Reykjavíkar.

Tað er ikki í fiskivinnu og landbúnaði at nýggj arbeiði verða skapt, og tí royna íslendskir myndugleikar at flyta tann háteknologiska ídnaðin og kunningar-ídnaðin út til tey smærru plássini.

Hetta verður ikki gjørt við beinleiðis studningi ella nøkrum sum kann avlaga kappingina, men við at flyta stovnar út til smáplássini, og at skapa mentanarlig- og frítíðartilboð á smáplássunum.

**Landbúnaður og økismenning**

Noel Davern legði dent á ta kollveltingina, sum er farin fram í írlendska búskapinum gjøgnum 90'ini, har ein miðvísur vinnulívspolitikkur hevur lagt Írland fram í búskaparliga oddin í Europa.

Miðsavning er eisini ein ovurstórur trupulleiki í Írlandi, og har hava myndugleikarnir sett sær fyri at flyta miðfyrisitingina út á smáplássini. 4.000 arbeiðspláss eru flutt úr Dublin, og 6.000 afturat verða flutt komandi árini.

Royndirnar higartil hava eydnast væl, og tað hevur verið ein fyrimunur at skapa fortreytir fyri almennari fyrisiting og kunningarídnað á teimum plássum, sum áður bert høvdu vanliga framleiðslu. Hetta verður eisini hildið at vera ein fortreyt fyri framhaldandi økismenning, tí tey nýggju arbeiðsplássini verða ikki skapt í vanligum ídnað, men í kunningarídnað av ymiskum slagi.

**Prince Edward Island**

Eisni Chester Gillan frá Prince Edward Island legði dent á, at »governments can't create jobs« — tað er ikki og kann ikki vera uppgávan hjá myndugeikunum at skapa arbeiðspláss við beinleiðis studningi til vinnulívið.

Í staðin skulu myndugleikarnir leggja dent á útbúgvingar- og menningarmøguleikar. Á Prince Edward Island hava teir í hesum sambandi m.a. bygt eina 15 km. langa brúgv inn til fastlandið, og givið 60 bygdum ókeypis atgongd til teldur og internet.

**Høgni Hoydal**

Sum umboð fyri Føroyar greiddi Høgni Hoydal serliga frá kollveltingini sum er hend í Føroyum farnu árini, har vit eru farin frá einum reinum studningsbúskapi sum gav undirskot, til ein sjálvberandi búskap, sum gevur stórt yvirskot. Hann greiddi eisini frá ætlanunum um føroyskt fullveldi, og segði at ein av høvuðsorsøkunum til hesa ætlan júst er at forða fyri, at Føroyar aftur enda í studningbúskapinum. »Verða Føroyar ikki sálvstøðugar er stórur vandi fyri, at tað búskaparliga ansni sum bygt er upp, fer fyri skjeyti, og at studningurin úr Danmark aftur fer at verða slúsaður inn í búskapin. Hendir tað er lítil ivi um, at vit stýra ímóti eini nýggjari kreppu«, segði hann.

Hann legði dent á, at vit sum kring Norðuratlantshavi hava framúr møguleikar at ganga undan í heiminum, tá tað snýr seg um at verja nattúrutilfeingi og umhvørvi og at skapa sterkar mentanir.

**Formligt samstarv**

Tað gjørdist skjótt greitt, at allar tær umboðaðu oyggjarnar á fleiri umráðum hava líknandi royndir og hava líknandi trupulleikar: Øll hava ringar royndir av studningsbúskapi, og royna at skapa fortreytir fyri einum sjálvberandi vinnulívi, øll hava trupulleikar av miðsavning, og royna at bøta um umstøður og trivnað á smáplássunum, øll hava í ov stóran mun útflutt lítið virkaðar vørur, og eru sinnað at økja um virði av útflutninginum við gransking og góðsking, øll leggja dent á útbúgving og mentanin, sum grundarlag fyri virkishuginum og menningini í oyggjasamfeløgunum.

Orsakað av at umstøðurnar líkjast so nógv, hildu allir ráðharrarnir, at økini og londini eiga at fara undir eitt meira formligt samstarv, soleiðis at tey kunu læra av royndunum hvør hjá øðrum.

Ráðharrarnir avráddu tí at hittast aftur á Ålandi næsta ár, og tá fara undir at leggja hetta samstarv til rættis.

# Føroyar liggja í lægra endanum

Áki Bertholdsen

Ofta verður tikið til, at føroyingar hava heimsins dýrastu olju- og bensinprísir at dragast við.

Men tað passar ikki.

Støðan er tvørturímóti, at bæði hvat brenniolju til sethús, og hvat dieselolju til bilar viðvíkur, liggja vit í lægra endanum í Evropa.

Tað vil siga, at nógva staðni eru avgjøldini á olju og bensini hægri enn í Føroyum.

Hetta sæst á einum yvirliti, sum Fíggjarmálastýrið hevur sett í eina frágreiðing, ið varð løgd fyri tingið í sambandi við at uppskotið til fíggjarlóg fyri 2001 varð lagt fram herfyri.

Tað kann eisini vera vert at leggja til merkis, at lond, sum hava oljuvinnu, eitt nú Noreg, Bretland og Danmark, hava hægri oljuprísir enn, hvat Føroyar hava.

Í øðrum yvirlitinum, sum er sett við hesum stubbanum, sæst, hvat 1.000 litrar av brenniolju kostaðu til húsarhaldini tann 15. september í ár.

Í sambandi við prísin á brenniolju, hevur oljuavgjaldið verið nógv umrøtt.

Í apríl mánaða í ár varð tað ásett til 80 oyru fyri liturin.

Frammanundan varð tað 95 oyru fyri liturin, men tað lækkaði eitt hálvt oyra, hvørja fer prísiurin hækkaði eitt oyra.

Og øvugt hækkaði tað eitt hálvt oyra, hvørja fer prísurin á olju lækkaði eitt oyra.

Í 1998 var avgjaldið 93 oyru í miðal fyri liturin og í 1999 var tað í miðal 98 oyru fyri liturin.

Landsstýrið sigur, at tað vóru nógvar orsøkir til, at tað varð lagt fast.

At tað var flótandi forðaði fyri kapping á økinum.

Samstundis var tað ógjørligt at leggja fíggjarætlanir fyri oljuavgjaldið, tá ið tað var skiftandi.

Og tað var eisini hildið at vera rættast, at brúkarin sjálvur merkti, hvussu marknaðarprísirnir á olju broytast.

Í hinum yvirlitinum sæst, hvat prísurin á blýfríum bensini og dieselolju til bilar kostaðu hendan sama dagin.

Tølini eru frá Statoil, Føroya Shell og Vejdirektoratet .

*Talva 15: Brennioljuprísir til vanlig sethús, 15.09.2000.*

| | Kr./1.000 litur |
|---|---|
| Danmørk | 7.763 |
| Svørríki | 5.627 |
| Noreg | 4.525 |
| **Føroyar** | **4.475** |
| Ísland | 3.730 |

*Hendan talvan vísir prísin á brenniolju til vanlig sethús tann 15. september í ár. Bæði í Danmark, Noregi og í Svøríki er oljan dýrari, enn í Føroyum.*

*Talva 16: Bensin- og diesel prísir í ymsum londum 15.09.2000.*

| | Bensin – blýfrítt 98 | | | Diesel | |
|---|---|---|---|---|---|
| | *Land* | *kr./liturin* | | *Land* | *kr./liturin* |
| 1. | Noreg | 10,42 | 1. | Bretland | 9,88 |
| 2. | Ísland | 10,24 | 2. | Noreg | 9,61 |
| 3. | Bretland | 9,74 | 3. | Svøriki | 9,27 |
| 4. | Háland | 9,51 | 4. | Danmørk | 7,74 |
| 5. | Svøriki | 9,14 | 5. | Sveis | 7,12 |
| **6.** | **Føroyar** | **8,95** | 6. | Belgia | 6,97 |
| 7. | Belgia | 8,93 | 7. | Italia | 6,96 |
| 8. | Danmørk | 8,89 | 8. | Háland | 6,87 |
| 9. | Finnland | 8,79 | 9. | Frakland | 6,71 |
| 10. | Frakland | 8,57 | 10. | Týskland | 6,48 |
| 11. | Italia | 8,44 | 11. | Ungarn | 6,26 |
| 12. | Týskland | 8,09 | 12. | Írland | 6,25 |
| 13. | Eysturriki | 7,85 | 13. | Finnland | 6,17 |
| 14. | Írland | 7,48 | 14. | Slovakia | 6,13 |
| 15. | Sveis | 7,17 | 15. | Eysturriki | 6,12 |
| 16. | Ungarn | 7,18 | 16. | Luksemborg | 5,60 |
| 17. | Portugal | 6,92 | **17.** | **Føroyar** | **5,51** |
| 18. | Spania | 6,89 | 18. | Spania | 5,37 |
| 19. | Pólland | 6,88 | 19. | Slovenia | 5,31 |
| 20. | Luksemborg | 6,84 | 20. | Kjekkia | 5,29 |
| 21. | Grikkaland | 6,74 | 21. | Pólland | 5,28 |
| 22. | Kjekkia | 6,74 | 22. | Grikkaland | 5,13 |
| 23. | Slovakia | 6,22 | 23 | Ísland | 5,05 |
| 24 | Slovenia | 5,65 | 24 | Portugal | 4,65 |
| **Miðalprísur** | | **8,01** | **Miðalprísur** | | **6,49** |

*Kelda: Vejdirektoratet.*

*Hendan talvan vísir, hvat ein litur av bensini og dieselolju til bilar kostar í ymsum londum í Evropa. Tað sæst, at nógvir bileigarar eru verri fyri í so máta, enn teir føroysku*







## Vetrardekk

Vit hava fingið vulkaniseraði vetrardekk á goymslu, við vælumtókta Nokia bananum.

| Til dømis: | | |
|---|---|---|
| | 155 x 13 | 460 kr. |
| | 175/70 x 14 | 580 kr. |
| | 185 x 14 RF | 600 kr. |

Allir prísir eru v/ MVG og skift.
Eyka fyri íspíkar 100 kr.

pf AUTO·VULK
FR-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
fartlf. 214865
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

## Bilar til sølu

| *Merki* | *Árg.* |
|---|---|
| Toyota LiteAce 2,0 Diesel van | 87 |
| Audi 100 2,2E Autm. | 87 |
| Opel Vectra 1,6 | 89 |
| BMW 320i | 91 |
| Citroën BX 16 RS | 88 |
| Kia Sephia 1,5 GTX | 97 |
| Ford Escort 1,8 | 96 |

*Lagalig fígging!*

Bilfríðkan
*Velbastaðvegur • 110-Tórshavn*
*Tel. 31 73 00 - 21 73 00*
FIAT
Sosialurin - 311820

SJÓ–FRAKT



SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tel. 32 22 22
Sosialurin - 311820


## Fólk søkist

Fólk søkist at arbeiða nakrar tímar um vikuna í klædnahandlinum Seytjan á Áarvegnum.

Viðkomandi skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða arbeiðssom og fyrikomandi.

Skrivlig umsókn verður at senda innan 16. okt. til:

**Seytjan**
**Áarvegur 12**
**100 Tórshavn**

Seytjan

Áarvegur 12 • 100 Tórshavn • Tel. 311305 • Fax 311304
E-mail: seytjan@post.olivant.fo

Sosialurin 311820

## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til 10 ára gamalt barn í Eysturoy.

Arbeiðið hjá stuðulinum verður, í neyvum samstarvi við avvarðandi barnaverndarnevnd og Almannastovuna og í samráð við heimið, at fara til ymisk ítriv við barninum, menna fakliga støðið og annars stuðla og menna barnið á allan hátt.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna, og stuðulin er fyribils játtaður fram til 30.06.2001.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 16.10.2000 og skulu stílast til:

**Almannastovan**
Att. Petra Joensen, sosialráðgevi
Postboks 3096
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fáast á tlf. nr. 31 54 80 lokal 127 hjá Petru Joensen og lokal 141 hjá Sigrun Bærentsen.

## Leiðari

til størri handil í Eysturoynni

Starvið sum leiðari í einum førandi handli í Eysturoynni verður við hesum lýst leyst at søkja.

**Starvið**
Vit bjóða tær eitt áhugavert leiðara starv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Somuleiðis bjóða vit góða løn og treytir, ið verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

**Tínir eginleikar**
Tú ert ágrýtin, stinnur í leiðslu og dugnaligur í samstarvi við okkara viðskiftafólk og samstarvsfelagar.

**Umsóknir**
Áhuga kunnu senda eina skrivliga umsókn við neyðugum skjølum til:

**Bill. mrk. 011100-A**
**Sosialurin, Postboks 76, 110 Tórshavn**

í seinasta lagi innan 1. november 2000. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.


## Seyður til sølu

Livandi ella flettur.

**Ring tlf. 373221 ella tlf. 370539**


STARV sosialurin

## Fólk søkist

til Tíðindablaðið Sosialin, marknaðardeildin

Vit sóknast eftir einum fólki at taka sær av dagliga arbeiðinum við sølu av lýsingum og øðrum fyrifallandi uppgávum.
Herundir er ein uppgáva at verða við til at menna og reka Internet Sosialin.

Tú:
- Ert ágrytin
- Dugir væl at tosa í telefon
- Hevur lætt at tosa við fólk
- Hevur áhuga fyri telduarbeiði
- Ert før/ur fyri at arbeiða undir tíðartrýsti
- Hevur hugflog og dugir at festa tað á pappíri
- Dugir væl føroyskt
- Kanst byrja skjótast gjørligt

Vit kunnu bjóða:
- eitt spennandi og mennandi starv, har tú gerst partur av eini vælvirkandi marknaðardeild
- Samskifti innan- og uttanlands við viðskiftafólk okkara
- Áhugaverdar og fjølbroyttar uppgávur

Umsóknarfreistin er 12. oktober 2000.
Løn samb. avtalu.
Umsóknin skal saman við viðkomandi skjølum sendast til:

Sosialurin
P.O. Box 76
110 Tórshavn
Att.: Dagbjørt Hansen

Tú ert vælkomin at ringja tel. 311820 at hoyra meira um starvið.
Spyr eftir Dagbjørt ella send ein e-mail til:
dagbjort@sosialurin.fo

Vit eru allatíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Her starvast í dag uml. 25 fólk.